## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, mikudagin mest av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 6 stig.

# Statoil tekur risasfet á føroyska landgrunninum

**Komandi trý árini verða ikki færri enn tríggir brunnar boraðir á landgrunninum fyri umleið 2 milliardir krónur. Statoil gongur á odda og fer at bora tveir av hesum.**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

Nú verður aftur blást í hornini á føroyska landgrunninum. Triumfhornini. Tí nú standa ikki færri enn tríggir leitibrunnar á skránni komandi árini. Og hetta er einki minni enn kærkomin tíðindi fyri føroyskar myndugleikar, sum hava brúkt nógva orku uppá at skapa áhuga fyri føroyska landgrunninum úti í heimi. Nú gevur hetta arbeiði ávøkstur.

Vinnumálaráðið sigur í tíðindaskrivi, at í sambandi við, at Johan Dahl, landsstýrismaður, hevur góðkent, at trý kolvetnisloyvi verða longd til 2013, er avtalað, at enn ein leitibrunnur skal borast á føroyska landgrunninum.

Loyvini, ið verða longd, eru nr. 006, nr. 009 og nr. 011. Brunnurin skal verða boraður og metingar av úrslitinum verða lidnar áðrenn loyvisskeiðini ganga út í 2013. Avgerð er ikki tikin um, hvørjum av loyvisøkjunum, brunnurin verður boraður á.

Loyvishavarar í loyvi nr. 006 verða frameftir Statoil, (99%) og Atlantic Petroleum (1%). Statoil verður framhaldandi fyristøðufelag. Anadarko, Amerada Hess, British Gas, Dong og Enterprise halda ikki fram. Í sambandi við leingingina er partur av loyvisøkinum latin innaftur.

Í loyvi nr. 009 verður Statoil einsamallur loyvishavari. Dong, Shell og Føroya Kolvetni halda ikki fram.

Í loyvi nr. 011 er Statoil einsamallur loyvishavari.

Johan Dahl, landsstýrismaður, fegnast um avtaluna og sigur: "Tað er sera hugaligt, at Statoil og Atlantic Petroleum eins og vit meta útlitini fyri at gera lønandi fund á føroyska landgrunninum vera so mikið góð, at feløgini vilja átaka sær at bora enn ein brunn her. At avgerð ikki er tikin um, á hvørjum loyvisøki brunnurin skal borast, kann harafturat takast sum jaligt tekin um, at fleiri góðir møguleikar eru at velja millum.

At vit innan fyri ein lítlan mánað hava fingið avtalur um tveir brunnar, fer vónandi at økja um ansin, eisini millum onnur oljufeløg, fyri møguleikunum á føroyska land-grunninum. Vit hava nú tríggjar brunnar fyri framman, har Eni í vár fer at bora tann fyrsta á loyvi 005.

Umframt at hetta er eitt jaligt stig á leiðini móti at finna kolvetni, er hetta ivaleyst eisini gott fyri tann partin av føroyskari vinnu, ið veitir vørur og tænastur til oljuvinnuna. Eg vóni og væntі, at leitivirksemið eisini fer at kasta av sær til tær vinnurnar."



*Rúni M. Hansen, føroyski stjórin í Statoil, sum hevur megnað at sannføra leiðsluna í Statoil í Noregi, at tað er rætt at gera íløgur í leiting við Føroyar*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 0 |
| Aberdeen | 1 |
| London | 4 |
| Tromsø | -5 |
| Bergen | -1 |
| Oslo | -3 |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -4 |
| Moskva | -7 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | -2 |
| Kiev | -4 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 10 |
| Malta | 12 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 1 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 13 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eutt djúpt lágtrýst, 977 hPa. vestan fyri Írland flytur seg spakuliga eystureftir og brúgvaløgini sunnan fyri Føroyar standa mestsum í stað.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Vestur-Noreg grynnist. Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga eystureftir og gevur góðveður á okkara leiðum um vikuskiftі.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/02 kl. 06⁰⁰ – 04/02 06⁰⁰. Hitin í gjár: -0,3°
Minsti hiti máldur í februar: -11,0° -
Mesti hiti máldur í februar: +11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 03/02 kl. 06⁰⁰ – 04/02 06⁰⁰.
Avfallið higartil í februar: 11 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 30. januar | Mánin næstur jørðini |
| 5. februar | Seinna kvarter |
| 13. februar | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. feb | 11:50 | - | 10:50 | 23:15 | 11:05 | 23:30 | 01:12 | 13:50 | 02:12 | 14:50 | 10:05 | 22:30 | 09:05 | 21:30 | - | 12:05 | 00:27 | 13:05 | 11:35 | - | 00:12 | 12:50 |
| 6. feb | 00:15 | 13:08 | - | 12:08 | - | 12:23 | 02:15 | 15:08 | 03:15 | 16:08 | 11:23 | 23:48 | 10:23 | 22:48 | 00:30 | 13:23 | 01:30 | 14:23 | 00:00 | 12:53 | 01:15 | 14:08 |
| 7. feb | 01:33 | 13:58 | 00:33 | 12:58 | 00:48 | 13:13 | 03:33 | 15:58 | 04:33 | 16:58 | - | 12:13 | 11:13 | 23:38 | 01:48 | 14:13 | 02:48 | 15:13 | 01:18 | 13:43 | 02:33 | 14:58 |
| 8. feb | 02:23 | 14:48 | 01:23 | 13:48 | 01:38 | 14:03 | 04:23 | 16:48 | 05:23 | 17:48 | 00:38 | 13:03 | - | 12:03 | 02:38 | 15:03 | 03:38 | 16:03 | 02:08 | 14:33 | 03:23 | 15:48 |
| 9. feb | 03:13 | 15:38 | 02:13 | 14:38 | 02:28 | 14:53 | 05:13 | 17:38 | 06:13 | 18:38 | 01:28 | 13:53 | 00:28 | 12:53 | 03:28 | 15:53 | 04:28 | 16:53 | 02:58 | 15:23 | 04:13 | 16:38 |